Nýggi handilsskúlastjórin, Reidar Nónfjall:

# - Fyrst og fremst skal grundarlag fáast

*Nýggi stjórin á Føroya Handilsskúla, Reidar Nónfjall, í nýggja arbeiðsumhvørvið hansara. - Eg vænti, at økið kring skúlan og umhvørvið sum heild verður nakað friðarligari enn tað, eg áður havi upplivað, og møguliga verður talan eisini um eitt starv, har lættari verður at meta um framtíðina, sigur nýggi skúlastjórin.*



**Fríggjadagin setti Mentamálaráðið Reidar Nónfjall sum nýggjan skúlastjóra á Føroya Handilsskúla, eftir at Ragnar Magnussen er vorðin fyrsti lærari í nýggja skúlanum í Kaldbak.**
**– Fyrst og fremst er uppgávan at ogna mær vitan og innlit í arbeiðið, sigur nýklakti skúlastjórin, sum hevði fyrsta arbeiðsdag sín í gjár**

NÝGGJUR SKÚLASTJÓRI
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Fyrrverandi strandferðslustjórin frá 1997-2002, 39 ára gamli Reidar Nónfjall, gleðir seg sera nógv til nýggju uppgávuna sum stjóri á Føroya Handilsskúla. Reidar Nónfjall vísir á, at stjórasessurin á Handilsskúlanum er eitt nýtt kapitull og ein spennandi avbjóðing í lívi hansara.

Fyrsti starvsdagur hansara sum stjóri á Føroya Handilsskúla var í gjár 1. september, og Sosialurin fekk orðið á hann, hóast hann sjálvsagt hevði nógv um at vera í nýggja umhvørvinum við Marknagilsvegin.

### Tríggjar høvuðsavbjóðingar

Spurdur, hvørjar høvuðsavbjóðingar liggja fyri framman í nýggja starvinum, vísir Reidar Nónfjall á tríggjar høvuðsuppgávur, sum hann saman við starvsfólkum sínum hevur.

– Tað fakliga, pedagogiska og fyrisitingarliga eru tríggjar høvuðsavbjóðandi uppgávur. Tað fakliga er fyrst og fremst knýtt at lærarunum, tað pedagogiska næmingunum, meðan tað fyrisitingarliga er tengt at fíggjarligu viðurskiftunum og starvsfólkapolitikkinum, eru fyrstu viðmerkingarnar hjá nýggja skúlastjóranum.

Reidar Nónfjall leggur afturat, at høvuðsmunurin og broytingarnar frá fyrrverandi starvið til nýggja stjórasessin fyrst og fremst er tengt at umhvørvinum.

– Eg vænti, at økið kring skúlan og umhvørvið sum heild verður nakað friðarligari enn tað, eg áður havi upplivað, og møguliga verður talan eisini um eitt starv, har lættari verður at meta um framtíðina, sigur nýggi skúlastjórin.

Reidar Nónfjall vísir á, at hann vónandi kann nýta tær royndir á leiðsluøkinum, hann hevur frá Strandferðsluni.

### Royndir í skúlaumhvørvi

Reidar Nónfjall er sum áður nevnt ikki ókendur í stjóresessi, men nýggi skúlastjórin hevur eisini royndir innan skúlans gátt.

– Seinasta árið havi eg undirvíst á Føroya Handilsskúla í leiðslumenning, strategimenning og projektstýring, og umframt útbúgving mína sum cand. merc. havi eg eisini verið próvdómari á Handilsskúlanum. Á henda hátt havi eg nakrar royndir í skúlaumhvørvinum, og vónandi kann eg nýta hetta til nakað gott til frama fyri øll, vísir fyrrverandi strandferðslustjórin á.

Sambært Reidar Nónfjall fara komandi mánaðirnir á skúlanum at vísa honum, hvørjar ítøkiligar og nýggjar uppgávur liggja honum fyri framman.

### Ongar broytingar í bræði

Spurdur, um nýggi handilsskúlastjórin ætlar at fremja nakrar broytingar, er hann avgjørdur.

– Tað hevði verið óseriøst at komið inn á nýggjan stovn og byrjað at broytt ymiskt, áðrenn eg havi savnað mær vitan og fingið innlit í skipanina, sigur Reidar Nónfjall avgjørdur. Hann vísir á, at uppgáva hansara fyrst og fremst er at seta seg inn í nýggja arbeiðið.

– Fyrst ætli eg mær at stinga fingurin í jørðina og seta meg inn í uppgávu stovnsins, bygnaðin, arbeiðið starvsfólksins og í fjórða lagi hvørjir tøknifrøðiligu møguleikar skúlans eru, sigur skúlastjórin á Marknagilsvegnum.

Sambært Reidari Nónfjall er henda gongd neyðug fyri at tryggja sær eitt grundarlag, og ikki fyrrenn tá kann ein meta um, hvussu skúlin skal mennast og koma víðari.

### Skúlin tiltalandi

Nýggi stjórasessurin er sambært Reidari Nónfjall ikki beinleiðis ein gamal dreymur, men umhvørvið skúlans hevur tiltalað nýggja stjóran.

– Síðani eg fór av Strandferðsluni, havi eg arbeitt nakað við fyrireiking av skeiðum og undirvísing, og mær hevur dámt sera væl at arbeitt við tí fakliga, sigur Reidar Nónfjall.

Reidar greiðir víðari frá, at tá hann sá lýsingina eftir nýggjum stjóra, gjørdi hann sær skjótt sínar hugsanir, og við áðurnevndu royndum í skúlaumhvørvinum samsvaraði leiklutur hansara við tað, søkt varð eftir.

– So vónandi felli eg inn í landslagið á Handilsskúlanum, sigur nýggi skúlastjórin við einum smíli.

### Virkin uttanfyri skúlan

39 ára gamli Reidar Nónfjall er eisini virkin uttanfyri skúlan, tí í løtuni er hann næstformaður í nevndini fyri Føroya Tele og somuleiðis nevndarlimur í Televarpinum.

– Hóast nýggja stjórastarvið ætli eg mær at halda fram í hesum sessum, og eg meti tað vera ein fyrimun at hava fingurin á pulsinum uttanfyri skúlan og vita, hvat rørist í vinnulívinum, sigur Reidar Nónfjall. Við at hava antennurnar úti ynskir hann eisini at hava betri innlit í, hvør tørvur er á undirvísing og førleikamenning á sjálvum skúlanum.

Umframt núverandi sessir starvaðist 39 ára gamli handilsskúlastjórin frá 1991-1997 sum fulltrúi á fíggjardeildini í Tinganesi, var síðani stjóri á Strandfaraskipum Landsins frá 1997-2002, og umframt at hava undirvíst á Handilsskúlanum hevur hann seinasta árið rikið egið virki, RN-Virkisleiðsla. Hann var næstformaður í Atlantsflog og stýrislimur í ábyrgdargrunninum frá 1994-1997, og í tíðarskeiðnum frá 1996-1997 var hann formaður í kommununevndini.

Reidar Nónfjall byrjaði sum nýggjur handilsskúlastjóri í gjár, og í samrøðuni við nýggja stjóran var tað stutta av tí langa fyrstu viðmerkingar hansara.

– Eg gleði meg sera nógv til nýggju uppgávuna!




*– Tað hevði verið óseriøst at komið inn á nýggjan stovn og byrjað at broytt ymiskt, áðrenn eg havi savnað mær vitan og fingið innlit í skipanina, sigur Reidar Nónfjall, nýggjur handilsskúlastjóri*



## Generalur hartar Bush

Amerikanski generalurin Wesley Clark, sum var ovasti í NATO frá 1997 til 2000, leggur stjórnina hjá George W. Bush, forseta undir at hava elvt til ruðuleika í Irak.

Í samrøðu við bretska sjónvarpið BBC sigur generalurin, at tað er USA, sum hevur gjørt, at yvirgangsmenn eru komnir upp í kríggið. Hann heldur, at amerikanska stjórnin átti at lagt størri dent á bardagan ímóti altjóða yvirgangi heldur enn at leypa á Irak, tí kríggið í Irak hevur havt júst ta øvugtu ávirkanina av tí, sum stjórnin ætlaði.

– Vit hava givið Osama bin Laden tíð til at endurskipa sín felagsskap og at útvega sær nýggja útgerð, og tað var júst tað, honum tørvaði, sigur Wesley Clark. Tað hoyrir ivaleyst við til hesi tíðindini, at generalurin umhugsar at stilla upp til forsetavalið næsta ár fyri demokratarnar.

## Sáðar iva um evruna

Tað var ikki sørt, at nógvir sviar kendu seg ørkymlaðar, tá Gøran Persson, forsætisráðharri, segði um vikuskiftið, at siga sviar ja til evruna, er tað ikki vist, at hon kemur í gildi ístaðin fyri krónuna tann 1. januar í 2006, sum ætlanin annars hevur verið. Hann legði afturat, at hann hevur ongantíð verið talsmaður fyri at halda fólkaatkvøðu um evruna, men at fólkaatkvøðan er eitt politiskt úrslit.

Tey, sum eru ímóti at seta evruna í gildi í Svøríki, tulkaðu alt fyri eitt orð forsætisráðharrans sum eina greiða ábending um, at tað er als ikki neyðugt at atkvøða fyri evruni, sjálvt um forsætisráðharrin og stjórnin mæla fólkinum til at gera tað. Teir borgarligu flokkarnir, sum taka undir við evruni, halda harafturímóti, at orðini hjá Gøran Persson vórðu ætlað at vísa á, at evran verður ikki sett í gildi, fyrr enn sviar eru fyrireikaðir til tess.

Annars hevur forsætisráðharrin eisini sagt, at atkvøða sviar nei nú, verður eingin fólkaatkvøða aftur um spurningin fyrr enn í 2010, og so kann evran í fyrsta lagi verða sett í gildi í 2013.

## Stuðlar tubbaks-dyrking

Í Grikkalandi, Spania og Italia dyrka bøndur tubbak, men fingu teir ikki stuðul frá ES, hevði tað als ikki loyst seg. Tey seinastu árini hava bøndurnir fingið góðar sjey milliardir krónur í stuðuli, og sambært ES-nevndini svarar stuðulin til heili 80 prosent av inntøkuni av tubbaksdyrkingini.

Umleið seks prosent av øllum tubbakkinum í heiminum verður dyrkað í teimum trimum londunum, men ES-londini framleiða umleið ein fjórðing av tí tubbaki, sum verður nýtt í samveldinum.

Í fleiri ár hava felagsskapir og heilsumyndugleikar mælt ES frá at stuðla teimum bøndrunum, sum dyrka tubbak, men Franz Fischler, landbúnaðarkommiserur, sigur, at fólk í ES-londunum fara ikki at roykja minni, sjálvt um stuðulin verður tikin av, og teir suðurevropeisku bøndurnir gevast at dyrka tubbak. Umleið 11.000 ES-bøndur dyrka tubbak, og tá heystað verður, arbeiða umleið 40.000 fólk í vinnuni, sigur ES-nevndin.

## Hoyra illa

Meiri enn 22 milliónir fólk í Evropa hava trupulleikar við hoyrnini. Talið veksur, og sambært ES kostar tað næstan 600 milliardir krónur árliga.

Granskingarkommiserurin hjá ES, Philippe Busquin, sigur við blaðið, at mong fáa hjálp frá hoyritólum, men at læknavísindin framvegis ikki er før fyri at lekja tey, sum fáa veika hoyrn. Hann sigur, at trupulleikar við hoyrnini kosta teimum einstøku londunum meiri og meiri, sum árini ganga, tí altsamt meiri pengar verða nýttir til serundirvísing, taliskeið og ymisk hjálpartól.

ES hevur mælt til, at størri dentur verður lagdur á at kanna, hví summi fólk fáa veika hoyrn ella gerast deyv. Granskarar eru komnir eftir, at ein hjá summum hevur tað nakað við arvaeginleikar at gera.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Fyrireikar ógvusligt lívfrøðiligt álop

**Í apríl skipaði yvirgangsleiðarin Osama bin Laden fyri einum fundi, har ætlanir vórðu lagdar um eitt lívfrøðiligt álop, skrivar tíðarritið Newsweek.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

– Tað næsta álopið hjá Osama bin Laden verður ógvusligari, enn tað ber til at ímynda sær, sigur ein kelda í afghansku rørsluni Taliban við Newsweek. Keldan leggur afturat, at hesaferð ætlar yvirgangsleiðarin at nýta lívfrøðilig vápn, og hon sigur seg vita við vissu, at al-Qaeda hevur slík vápn.

Sambært Newsweek kannar al-Qaeda í løtuni, hvussu tey lívfrøðiligu vápnini skulu flytast á álopsstaðið, og hvussu tey skulu nýtast. Taliban-keldan sigur, at hesir spurningarnir vórðu umrøddir á einum fundi einastaðni í teimum afghansku fjøllunum í apríl mánað, beint eftir at stýrið hjá Saddam Hussein var fallið.

Á fundinum vóru fleiri limir í al-Qaeda og umboð fyri víðgongdar islamskar felagsskapir í Usbekistan og Kekenia.

Amerikanararnir vilja vera við, at al-Qaeda hevur sent fólk til Irak, og Taliban-keldan sigur við Newsweek, at á fundinum í apríl varð avgjørt at senda ein av næstu monnum bin Ladens, Said al-Adil, til Irak at standa fyri atsóknum har.

# Irak fingið nýggja stjórn



*Samstundis sum irakar hava fingið stjórn, hava amerikanararnir sett í verk eitt átak fyri at finna stuðlar hjá Saddam Hussein. Her hava tríggir amerikanskir hermenn tikið ein iraka í bygdini Telog Sabee norðan fyri Bagdad.*

**24 menn og ein kvinna manna ta nýggju tillagingarstjórnina í Irak. Shiamuslimarnir hava meiriluta í stjórnini.**

IRAK
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Stjórnarráðið í Irak almannakunngjørdi í gjár ráðharralistan í nýggju tillagingarstjórnini, sum skal stýra landinum, til umstøðurnar loyva einum demokratiskum vali. Sambært amerikonsku herleiðsluni verður tað einaferð næsta ár.

Stjórnin hevur ongan forsætisráðharra, sum annars er vanligt, men ein formann, og teir ymsu partarnir skulu skiftast um at hava formannin.

25 ráðharrar eru í stjórnini, og av teimum er ein kvinna. Shiamuslimarnir, sum eru tann størsti átrúnaðarbólkurin í Irak, hava trettan ráðharrar og sostatt meirilutan. Teirra millum eru Ibrahim Mohammad Bahr al-Ulum, sum er oljumálaráðharri, og Nuri Badran, sum er innanríkisráðharri.

Sunnimuslimarnir, sum tann frákoyrdi einaræðisharrin Saddam Hussein var úr, hava fimm ráðharrar, og ein teirra, Kamal al-Kailani, er fíggjarmálaráðharri. Kurdarnir fáa eisini fimm ráðharrar, og kurdin Hoshiar al-Zibari, er uttanríkisráðharri. Teir báðir seinastu ráðharrarnir eru ein turkmeni og ein kristin.

Í Bagdad verður sagt, at tað fer at taka næstan eitt ár, áðrenn tær ymsu ráðharrastovurnar kunnu virka, tí at kalla hvør einasta ráðharrastova varð rænd undir og aftan á kríggið.